GAMAL Í GARÐI

*- Vit fingu eitt gott øki heruppi, og keyptu tað, sigur Hans Jákup Staksberg, stjóri.*



# Gamal og royndur á økinum

**ELSTUR Á HÁLSI** Tað eru mong, ið kennast við fyritøkuna Guttesen & Staksberg, sum hevur luttikið í mongum ymiskum arbeiðum kring landið tey seinastu nógvu árini. Talan er bæði um størri og smærri verkætlanir. - Vit hava altíð roynt at laga okkara virksemi til tørvin. Tí hava vit yvirlivað líka til dagin í dag, sigur Hans Jákup Staksberg, stjóri.

Orð: Snorri Brend
Mynd: Jens Kristian Vang

**Havn:** Hóast arbeiðsfólk hjá stóru byggifyritøkuni hava gjørt arbeiðir kring alt landið, hevur skrivstovan altíð verið í Havn. Fyrstu árini á ovastu hædd í Perluni niðri í Vágsbotni, síðani á Hoyvíksvegi og nú á Smyrilsvegi.

Skrivstovan sjálv sær ikki út av so nógvum. Visti onkur ikki betri, kundi viðkomandi eins væl hildið, at her var talan um eini sethús her á Smyrilsvegi 3.

Umgyrt av handilsbygningum hevur fyritøkan Guttesen & Staksberg, sum byrjaði virksemið sítt í 1970, høvuðssætið sítt.

Tá fyritøkan stovnaði eitt dótturfelag sum bygdi ein virkisbygning, var talan um eitt nýbrot, bæði so og so. Ætlanin var í fyrsta umfari at fara undir nýggja framleiðslu, men meiri enn tað.

Fyritøkuni tørvaðist góð og stór høli, har hetta endamálið kundi verða framt í verki. Og soleiðis endaði við - ella byrjaði tað við - at virkisbygningurin á Smyrilsvegi 1 varð bygdur. Sum tann fyrsti í økinum.

## Vesturbú

Fyri góðum 30 árum síðani var hetta økið munandi berari enn nú. Tað var ikki nógv sum sást til virksemið, sum er har í dag.

Tað vóru kortini tær fyritøkurnar sum høvdu sett økið á Hálsi sum ein part av framtíðarætlanum teirra. Millum hesar var fyritøkan sum í dag kallast Guttesen & Staksberg.

Ætlanin teirra var at bróta upp úr nýggjum, við at fara undir framleiðslu av føroyskum sniðhúsum. Teir stovnaðu fyritøkuna Vesturbú, hvørs navn segði frá bæði endamáli og staðseting.

- Meiningin var nevniliga, at vit skuldu byggja eitt verkstað í Sandavági, har vit skuldu byggja hesi húsini, greiðir Hans Jákup Staksberg frá.

- Men henda ætlanin varð kortini ongatíð framd í verki.

Tað var kanska meiri av tilvild, at teir ístaðin avgjørdu at byggja eitt framleiðsluvirki í Havn.

> **Hetta økið vakti beinanvegin okkara áhuga. Og eg fór tí oman í býráðið at tosa nærri við teir um hetta økið. Vit fóru ikki at keypa tað í óðum verkum**

## Lýsing

Ein dagin í seinnu helvt av 70'unum komu teir fram á eina lýsing í Dimmalætting, har eitt grundøki á vegamótinum Tjaldursvegur og Hoyvíksvegur var til sølu.

- Hetta økið vakti beinanvegin okkara áhuga. Og eg fór tí oman í býráðið at tosa nærri við teir um hetta økið. Vit fóru ikki at keypa tað í óðum verkum, greiðir Hans Jákup frá.

Ynskið teirra var at vita, um hetta einstaka grundøkið og ætlan teirra við tí, var í tráð við framtíðarætlanirnar hjá kommununi við økinum sum tá var útlagt sum atvinnuøki.

Nakað seinni var ætlanin í Sandavági slept, samstundis sum teir gjørdu eitt makaskifti við kommununa um eitt størri øki. Og soleiðis var grundarlagið lagt undir virksemið í tí sum gjørdist dótturfelag teirra, - Byggimiðstøðin á Hálsi.

> **Vit hava altíð roynt at laga okkara virksemi til tørvin. Tí hava vit yvirlivað líka til dagin í dag**

- Her fingu vit eisini sera góðar umstøður til at framleiða tey føroysku sniðhúsini, samstundis sum vit høvdu entreprenør-arbeiðir ymsastaðni, vísir Hans Jákup á.

Um hetta mundið var Smyrilsvegurin ikki til, men tá virksemið kom í gongd, varð vegurin gjørdur, og Byggimiðstøðin fekk húsanummar 1 á vegnum.

## 80 fólk

Tað sum ger hesa søguna áhugaverda er, at um hetta mundið var einki bygt her á Hálsi.

Teir hjá Guttesen & Staksberg átóku sær at gera Hoyvíksvegin longur niðan, framvið barnaheiminum hjá Torkil Johannesen, sum verður umrøddur í aðrari grein í blaðnum.

Tað var eisini júst hetta við entreprenør-arbeiðinum sum so líðandi kom at taka yvir virksemið hjá teimum. Og í 1984 varð tann stóri bygningurin seldur, og kom seinni at hýsa ymiskum grunnum og seinni eisini Rúsdrekkasølu Landsins.

Áðrenn flutt var út í 1985, høvdu teir latið umsitingarbygningin á Smyrilsvegi 3 byggja, og í dag er hann karmur um virksemið hjá Guttesen & Staksberg.

- Ja, nógv er broytt hesi árini, sigur Hans Jákup. - Vit kundu hava upp í 80 fólk til arbeiðis um summarið og eini 60 um veturin, umframt tey sum starvaðust hjá dótturfelagnum, tá mest var at gera.

- Í dag eru vit vanliga eini 20 fólk í fyritøkuni. Og nú er ein stórur partur av okkara arbeiði at byggja og selja íbúðir og raðhús. Nei, tað er ikki tað sama.